## Bygdin fer í havið

Tey umleið 400 fólkini í inuittabygdini Kivalina í amerikanska statinum Alaska hava stevnt oljufelagnum Exxon Mobile og 23 øðrum feløgum. Bygdarfólkið krevur feløgini dømd at viðurkenna, at teirra $CO_2$-útlát hóttir bygdina og tilveruna hjá fólkinum har. Kivalina er á einum lágum tanga, og tey seinastu árini er alt meiri og meiri farið burtur av tanganum og í havið. Bygdarfólkið gevur veðurlagsbroytingunum skyldina og vil hava endurgjald.




*Kivalina er einar 1.000 kilometrar í útnyrðing úr Anchorage*

## Rinda nógvar rentur

Tey seinastu árini hava danir lænt nógvar pengar, og tá rentan harafturat er hækkað í seinastuni, merkir hetta, at rentuútreiðslurnar hjá dønum eru vaksnar nógv. Ein uppgerð hjá Tjóðbankanum vísir, at í síðsta mánað rindaðu donsku húsarhaldini 10,2 mia. krónur í rentum fyri lán, sum tey hava frá bankum og realkredittfeløgum. Til sammetingar nevnir bankin, at í februar í 2005 rindaðu húsarhaldini 6,4 mia. krónur í rentum.

# Kvinnurnar storma fram



*Fyri góðari viku síðani varð Annika Mittún Jacobsen sett sum stjóri í samanlagda stovninum, Kringvarpi Føroya. Hvørki Útvarp Føroya ella Sjónvarp Føroya, sum vórðu løgd saman fyri góðum trimum árum síðani, hava fyrr havt kvinnuliga stjóra*
*Savnsmynd*



*Selma Ellingsgaard, sum er útbúgvin sosialráðgevi, varð fyrstu ferð vald í nevndina í Starvsmannafelagnum í 2002 og hevur verið næstforkvinna seinastu tvey árini. Á aðalfundinum 8. mars verður hon vald til forkvinnu í felagnum, sum tann fyrsta nakratíð, hást 70 prosent av limaskaranum eru kvinnur*
*Mynd: Starvsblaðið*



*Tá Jan Mortensen fór í stjórastarv í FT Samskifti, var tað Marita Rasmussen, sum setti seg í stjórasessin í Vinnuhúsinum*
*Savnsmynd*



*Átta kvinnur sita nú í løgtinginum og tríggjar í landsstýrinum. Í Løgtinginum sita: Annika Olsen, Rósa Samuelsen, Eyðgunn Samuelsen, Katrin Dahl Jakobsen, Annita á Fríðriksmørk, Bergtóra H. Joensen, Heidi Petersen og Olga Biskopstø. Og í landsstýrinum: Helena Dam á Neystabø, Bjørt Samuelsen og Kristina Háfoss*
*Savnsmyndir*

### Skeiva kynsbýtið millum menn og kvinnur má sigast av vera munandi minni skeivt nú, enn tað var fyri bara hálvum ári síðani, tá tað kemur til oddasessir í føroyska samfelagnum

JAVNRÆTTUR

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Um tað er tilvildarligt, ella um tað er Demokratia og drúgva orðaskiftinum um javnrætt fyri at takka undan bæði fólkatings- og løgtingsvali, er torført at geva nakað greitt svar uppá. Í øllum førum er nógv hent seinastu fáu mánaðirnar, sum broyta samlaðu myndina av kynsbýtinum í tungu sessunum í føroyska samfelagnum.

Ein kvinna - Marita Rasmussen - stendur nú á odda fyri Vinnuhúsinum, sjey kvinnur móti trimum eru valdar á Løgting, tríggjar móti ongari í landsstýrið, og eftir at samgonga varð skipað, eru átta kvinnur at finna í Løgtinginum. Samstundis er tað fyrstu ferð, at ein kvinna er forkvinna í fíggjarnevndini. Tað er Eyðgunn Samuelsen, ið júst var forkvinna í Demokratia, sum varð lagt niður við ársskiftið, men sum møguliga verður endurreist.

Og fyri góðari viku síðani valdi stýrið fyri Kringvarp Føroya Anniku Mittún Jacobsen sum stjóra fyri samanlagda stovnin.

Um góðar tvær vikur - á sjálvum kvinnudegnum 8. mars - verður Gunleivur Dalsgaard avloystur av eini kvinnu í formannsessinum fyri Starvsmannafelagið. Bert eitt valevni er, og tí verður tað næstforkvinnan seinastu tvey árini, Selma Ellingsgaard, ið skal standa á odda fyri størsta almenna fakfelagnum í landinum.

Hetta er fyrstu ferð í 47 ára gomlu søgu felagsins, at ein kvinna skal standa odda fyri einum av størstu fakfeløgum í landinum, skrivar Starvsblaðið. Hetta, hóast 70 prosent av limaskaranum eru kvinnur.